# Íslendingar fáa ikki lán

Hóast teir báðir størstu bankarnir í Norðurlondum, Nordea og Danske Bank, læna pengar tvørtur um norðurlendsku landamarkini við veð í fastari ogn, eru hesar sømdir ikki galdandi fyri íslendingar. Í Noreda siga tey við íslendsku útvarpsstøðina Stöð 2, at bankin veit lán ímóti veð í fastari ogn í fleiri londum, men ikki í Íslandi, tí har hevur bankin onga deild og heldur ikki tann neyðuga kunnleikan um virðið á fastari ogn í Íslandi.



*Nordea og Danske Bank lata ikki lán við veð í fastari ogn í Íslandi (Mynd: Vísir)*

# Stolin bátur upp á land

Í samráð við Interpol hevur íslendska løgreglan gjørt av at seta týska stuttleikabátin Ely upp á land á Hornafirði, har báturin hevur ligið, síðani hann kom hagar fyri fimm vikum síðani. Tað vóru niðurlendingar, sum sigldu bátin til Íslands, men sambært løgregluni vistu teir ikki, at báturin var stolin í Týsklandi. Teir vórðu bara spurdir, um teir kundu føra hann til Íslands. Íslendska løgreglan hevði illgruna um rúsevnasmugling, men fann einki umborð á bátinum.

# Gourmet borðreiðir við aldum toski úr Hvalba

**- Matstovan Gourmet í Havn hevur roynt alda toskin á matstovuni, og royndirnar eru góðar, veit Vinnuhúsið at siga**

ALDUR TOSKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyri stívliga einum ári síðan settu tvey føroysk feløg fyrstu toskaynglini út. Fiskur varð settur út á Árnafirði, har fiskurin gongur í nótum – og í Hvalba, har fiskurin gongur í kørum, sum standa uppi á landi.

Felagið, sum stendur fyri toskaalingini á Árnafirði, er Faroe Salmon og felagið, sum stendur aftanfyri alingina í Hvalba, er Faroe Cod Farm.

Í grein í síðstu viku høvdu vit samrøðu við Mikkjal Hammer, ið er maðurin, sum saman við svági sínum slóðaði fyri í Hvalba.

Tað er Fiskaaling, ið hevur syrgt fyri, at feløgini fingu toskayngul at seta út. Størsti partur av ynglinum er undan toski av Føroyabanka, meðan ein minni partur er undan toski av landgrunninum.

### Royndur á matstovu

Heimasíðan hjá Vinnuhúsinum veit at siga, at higartil hevur toskaalingin gingið hampiliga væl.

- Faroe Cod Farm hevur gjørt eina lítla roynd at taka tosk fyri at kanna eftir, hvussu dygdin á fiskinum roynist. Matstovan Gourmet í Havn hevur roynt alda toskin á matstovuni, og royndirnar eru góðar.

Heimasíðan veit eisini at siga, at royndir eru gjørdar á virkinum hjá Delta Seafood á Tvøroyri at salta fiskin.

- Hesar royndir vísa, at fiskurin er egnaður til saltflak, men at hann ikki er líka væl egnaður sum flaktur fiskur. Orsøkin er helst, at fiskurin ikki varð hungraður undan tøkuni.

### Áhugaverd framtíð

Faroe Salmon hevur ætlanir um at lata fiskin ganga til heystar komandi ár, tá ið hann væntandi fer at viga umleið 4 kilo. Í Hvalba er ætlanin hinvegin at taka fiskin í vár og fram til summarið.

- Spennandi verður at síggja, hvussu fer at ganga við kynsbúgvingini av fiskinum.

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum halda tey, at áhugavert verður at síggja niðurstøðurnar hjá báðum feløgunum, Faroe Salmon og Faroe Cod Farm, tá ið tíðin gongur.



*Tað er Fiskaaling, sum hevur latið Faroe Salmon og Faroe Cod Farm toskayngulin, sum nú gongur á Árnafirði og í Hvalba*

*Mynd: Fiskaaling*

# Spennandi við vøkstrinum



*Spenningur er um, hvørt toskur av Føroyabanka fer at veksa skjótari enn toskur av landgrunninum, tá ið tíðin gongur*

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað, sum fleiri ivaleyst meta vera serliga spennandi við toskaalingini í Føroyum, er, hvørt munur er á vøkstrinum hjá toski av Føroyabanka og toski av landgrunninum annars. At munur er úti í villa havumhvørvinum, veit næstan hvørt mansbarn, men um hesin munur eisini fer at koma til sjóndar í fangilsi, veit eingin enn við vissu.

Tað eru mong ár síðan, at sakkunnleikin á økinum fyrstu ferð gjørdi vart við, at toskurin á Føroyabanka er ein serstakur stovnur - at hesin hevur eina serstaka blóðtýpu og at munur er á rygggeiðslunum á hesum fiski og toski á landgrunninum annars.

Tann stóri spurningurin er, um vakstrarmunurin hevur tilknýti til havumhvørvi – ella, um tað er fiskurin sjálvur, sum ger munin.

Ígjøgnum fleiri ár hava talvur verið kendar, sum vísa, hvussu nógv skjótari toskurin á Føroyabanka veksur í mun til toskin á landgrunninum.

Bæði í nótunum á Árnafirði og í kørunum í Hvalba hava teir bæði sløgini av toskayngli, og tí verður áhugavert og spennandi at síggja, tá ið tíðin gongur, um sjónligur vakstrarmunur er.

Sosialurin kann einki vátta í hesum sambandi, men líkt er til, at sjónligur vakstrarmunur enn ikki er at síggja.

Spurningurin er so, um hesin munur kemur til sjóndar, sum tíðin gongur – ella, um toskurin av Føroyabanka bert veksur skjótari, tá hann er í sínum egna umhvørvi á Bankanum.

# »Reyð« tøl í toskaaling

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað gongur striltið hjá norðmonnum at fáa lønsemi í aling av toski. Flestu feløg, sum fáast við hesa aling, hava hall – og stór hall – í roknskapunum. Norðmenn ugga seg tó við, at alingin enn er á einum uppbyggingarstigi, sum tikið verður til.

Feløgini Grieg Cod Farming AS og Lofitorsk AS hava bæði munandi hall í roknskapunum fyri 2006. Felags fyri allar toskaalarar í Noregi, sum hava latið inn roknskap fyri 2006, er, at feløgini hava hall.

Rakstrarætlanirnar halda ikki, og ein orsøk er, at nógv yngul doyr, áðrenn tað blívur til nakað.

Grieg Cod Farming AS hevur í sínum rakstrarroknskapi heilar 40,9 miljónir norskar krónur í halli – fyri skatt. Hetta er av einum umsetningi upp á einans 9,8 miljónir krónur.

Lofitorsk AS stendur seg frægast.

Av einum umsetningi upp á 13,2 miljónir norskar krónur, hevði Lofitorsk AS eitt hall í fjør upp á 3 miljónir krónur fyri skatt.